# Chelsea heldur kósina

**Hóast tað tók sína tíð, áðrenn Chelsea fekk hol á ímóti Portsmouth, endaði tað við einum tryggum 2-0 sigur til oddaliðið**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*
*skorini@gjk.dk*

Chelsea liðið var møguliga ikki á toppinum eftir torføru uppgávuna mikukvøldið, tá Barcelona var á vitjan. Tí hevði Chelsea ilt við at bróta verjuna hjá botnliðnum Chelsea niður.

Men miðskeiðis í seinna hálvleiki var tað sum ikki einaferð miðvallarin og toppskjútti hjá Chelsea, Frank Lampard, ið legði oddaliðið framum. Nakað seinni sló Arjen Robben sigurin fastan, tá hann skoraði til 2-0. Chelsea er nú fimtan stig framman fyri Manchester United, og tí er ikki nógv, ið bendir á, Chelsea fer at snáva móti endanum.

Arsenal vann 1-0 á Bernabeu ímóti Real Madrid týskvøldið, men í dag gjørdist gerandisdagurin í Premier League aftur veruleiki. Arsenal var á vitjan hjá Blackburn, ið vann 1-0. Norðmaðurin Morten Gamst Pedersen skoraði einasta málið.

Botnliðið Birmingham fekk í dag ein sera umráðandi sigur, tá eitt annað botnlið, Sunderland, var á vitjan. Emile Heskey skoraði einasta málið í dystinum fyri steðgin.

Newcastle fekk enn ein sigur, tá Everton var á vitjan. Norðurenska felagið vann 2-0, og Nolberto Solano skoraði bæði málini.

# United stórsigur í finaluni

**Manchester United vann sunnudagin Carling Cup finaluna í stórum stíli. Mótstøðuliðið Wigan mátti taka til takkar við einum 4-0 tapi á Millennium Stadium í Cardiff**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*
*skorini@gjk.fo*




*Heimsins dýrasti verjuspælari slapp loksins at vinna eitt steyp. Sjálvur hevði Ferdinand hótt við, at gjørdist talan heldur ikki um nakran sigur í ár, so kundi hann verða noyddur at finna sær annað felag*

*Mynd: Reuters*

Tað mundi koma ógvuliga væl við hjá Sir Alex Ferguson, tá menn hansara tryggjaðu felagnum enn eitt steyp. Ferguson hevði undan dystinum sagt, at um hann ikki megnaði at føra í øllum førum eitt steyp til Old Trafford í ár, var framtíð hansara sum venjari felagsins í vanda.

Og dreingir Fergusons gjørdu eftir boðum meistarans. At kalla eingin slingur var í valsinum, tá United-liðið vann heili 4-0 á uppflytarunum úr Wigan.

Wayne Rooney legði United framum eftir hálvum tíma. Hann fekk bóltin heldur heppið við sær, tá tveir verjuleikarar fóru eftir bóltinum, og hann sendi framvið málverjanum til 1-0, sum eisini var støðan í steðginum.

Beint eftir steðgin hevði Wigan eina góða roynd, tá Henri Camara gjørdist leysur úr spískum, men Van der Sar bjargaði. Eftir hetta setti United seg á dystin og við trimum málum innanfyri seks minuttir avgjørdu teir reyðu úr Manchester dystin.

Fyrst skoraði Louis Saha til 2-0, síðani økti Christiano Ronaldo til 3-0 og at enda slerdi Wayne Rooney sigurin fastan við málinum til 4-0.

## Atlantic Airways-kappingin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 7 | 4 - 1 - 2 | 455 | 400 | 55 | 17 |
| 2 | H71 | 6 | 4 - 0 - 2 | 433 | 366 | 67 | 16 |
| 3 | StÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 430 | 419 | 11 | 16 |
| 4 | VÍF | 6 | 4 - 1 - 1 | 437 | 422 | 15 | 15 |
| 5 | KÍF | 7 | 2 - 0 - 5 | 415 | 454 | -39 | 6 |
| 6 | Neistin | 7 | 0 - 0 - 7 | 431 | 540 | -109 | 1 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dráttur | 17 | 15 - 2 | 48 | 22 | 26 | 20 |
| 2 | TB | 17 | 10 - 7 | 37 | 24 | 13 | 16 |
| 3 | SÍ | 17 | 10 - 7 | 37 | 31 | 6 | 13 |
| 4 | ÍF | 17 | 9 - 8 | 37 | 31 | 6 | 12 |
| 5 | KÍF | 17 | 4 - 13 | 21 | 43 | -22 | 7 |
| 6 | Mjølnir | 17 | 3 - 14 | 17 | 46 | -29 | 4 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - v t | t sett | +/- sett | sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 13 | 11 - 2 | 35 | 15 | 20 | 15 |
| 2 | Mjølnir | 14 | 9 - 5 | 33 | 17 | 16 | 14 |
| 3 | SÍ | 13 | 8 - 5 | 30 | 20 | 10 | 10 |
| 4 | ÍF | 13 | 5 - 8 | 21 | 28 | -7 | 7 |
| 5 | Nøvan | 13 | 0 - 13 | 0 | 39 | -39 | 0 |

# Coventry í tryggari støðu

Claus Bech Jørgensen sat á beinkinum allar 90 minutturnar, tá Coventry leygardagin vann 1-0 á Burnley.

Sigurin ber við sær, at Coventry eftir eina sera soltna byrjan nú spakuliga er farin at trýsta seg upp móti sonevndu play-off plássunum, har seinasti møguleikin fyri Premier-League fótbólti er at finna.

Skal Coventry røkka somikið langt upp, so skal tað tó leggja serstakliga væl fyri seinasta partin av kappingini. Ikki bara skal Coventry vinna sítt, men fleiri av ovaru liðunum skulu eisini missa hampuliga nógv, og tí man tað vera so sum so við uppflytaravónunum í ár. Hinvegin kann felagið fegnast um, at tey í góðari tíð eru komin væl og virðiligа burtur úr niðurflytingarvandanum, og tí longu nú kunnu rætta tankarnar móti komandi kappingarári.

**-mørk**

Fjeppari?
Les um ítrótt í Sosialinum



# Tvøramaður við til at søkka United

Claus Bech Jørgensen er ikki einasta spælarin í næst bestu ensku røðini, sum hevur føroyskar ílegur í sær.

Á liðnum hjá QPR er Marc Nygaard nevnliga fastur maður av álopinum. Hálvi tvøramaðurin hevur áður roynt seg í hollendskum og italskum fótbólti, og nú er tað so í Onglandi, at hann ger um seg.

Um vikuskiftið vitjaði QPR hjá Sheffield United, sum tykist vera væl ávegis uppflyting til Premier League, men púrasta óvæntað vann QPR dystin.

Marc Nygaard skeyt fyrsta málið í dystinum eftir bara seks minuttum. Vertirnir komu tó bæði á javnt og framum, áðrenn teir eisini misnýttu brotsspark, og tað skuldi vísa seg at verða dýrt. Við einum sjálvmáli fekk QPR nevnliga javnað, áðrenn fyrrverandi Chelsea-framherjin, Paul Furlong skeyt sigursmálið eitt korter fyri leiklok.

**-mørk**

# Henry verður verandi

Hetta segði Real Madrid forsetin, Florentino Perez, eftir dystin millum Real Madrid og Arsenal, har Henry skoraði einasta málið. Perez varð spurdur, um Real hevði í hyggju at keypa Henry frá Arsenal í summar. Svarið hjá forsetanum var, at Arsenal vildi hava Henry at vera verandi, og hann var sjálvur sannførdur um, at Henry fór at velja at leingja sáttmálan við Arsenal.

Gitingarnar um framtíð Henrys eru annars nógvar, og Real Madrid og Barcelona er í løtuni favorittar at lokka Henry til sín komandi kappingarár. Tó er einki komið uppá pláss hesum viðvíkjandi, tí Henry framvegis er í samráðingum við Arsenal.

**-sís**